# Søkt verður eftir

**fólki til alibrúk okkara á Fuglafirði**

Ísambandi við nýggja útseting av sílum á Fuglafirði, verður við hesum søkt eftir tveimum røskum fólkum. Einum alara og einum alaralærlingi.

**Alari**
Til starvið sum alari er tað ein fyrimunir, um tú hevur royndir at arbeiða við aling, men er hetta tó ikki nøkur treyt. Hevur tú eginleikar sum nærlagni, røkiskap, evni til at samskifta og í felagsskapi at røkka settum málum, so er tað tær vit møguliga leita eftir. Væntað verður at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, dugir at nýta bát og hevur ein ávísan førleika í at arbeiða við togverki. Arbeiðið er vanlig arbeiðstíð, umframt at tú kemur at verða í eini vaktarskipan. Løn sambært avtalu.

**Alaralærningur**
Hevur tú áhuga í at útbúgva teg sum alara, so er ein spennandi møguleiki her. Væntað verður, at tú ert sjálvstøðugur, arbeiðssamur, røkin og hevur stóran áhuga í at arbeiða við livandi fiski. Læran er skipað við praktiskum arbeiði og við skúlagongd á fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. Høvuðsarbeiðið er røkt av fiski, men tú kemur eisini at arbeiða við togverki og neti, umframt øllum tí tekniska útbúnaðinum, ið er á alistøðini. Løn sambært sáttmála.

Um hetta er nakað fyri teg, so send eina skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum viðmælum skjótast gjørligt til:

**Vestlax**
Postboks 82, 410 Kollafjørð,
Fax 477002, Tlf. 477000 ella
e-mail: leif@vestlax.fo

Umsóknarfreist: 8. februar 2006

# Kunngerð

**um framløgu av broytingum av byggisamtykt**

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954, um byggisamtykt og býarskipan við seinni broytingum, verður við hesum gjørt kunnugt, at uppskot til broytingar av byggisamtykt fyri Sjóvar kommunu verður lagt fram til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 30. januar 2006 til 20. februar 2006.

- nýggj áseting til D-økið:

**Øki D4:**
a) Økið verður lagt av til kappróðrarneyst, venjingarhøli, bilstøðlar og tílíkt.
b) Útstykking kann bert fara fram eftir ætlan, sum fevnir um natúrligan part av økinum, sum kommunustýrið góðkennir.
c) Størsta loyvda byggistið er 0,5
d) Størsta loyvda nýtingarstig er 0,6
e) Einki hús má vera hægri enn 7 m til yvirgrind og 9 m til mønu, mált frá miðaljørðildi (í miðal við húsahorn)
f) Hús mugu ikki verða sett nærri bryggjutrom ella grannamarki enn fyriskipað er av avvarðandi myndugleika.

Møgulig mótmæli skulu vera skrivlig, og verða kommunustýrinum í hendi í seinasta lagi 20. mai 2006.

**Sjóvar kommuna**
**Skúlavegur 10 · Strendur**

# Navnakapping

Í samband við at barnagarður verður bygdur á Strondum, verður útskrivað navnakapping til barnagarðin.

Uppskotini skulu skrivast á ein lepa og leggjast í ein brævbjálva við frámerki á. Gott hevði verið, um ein frágreiðing um, hví júst hetta navnið er hóskandi til barnagarðin, fylgir við.

Avsendari skal ikki skrivast á brævbjálvan.

Í ein annan brævbjálva, við sama frámerki, skal navnið á tí, ið eigur uppskotið skrivast.

Merki brævbjálvan »Navnakapping«.

Uppskotini skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinsta lagi 1. august 2006.

Kommunustýrið skilar sær rætt til ikki at brúka nakað uppskot.

Velur kommunustýrið eitt uppskot, fær vinnarin 3.000,00 krónur í virðisløn.

Navnið verður avdúkað tá barnagarðurin letur upp.

**Sjóvar kommuna**
**Skúlavegur 10 · 490 Strendur**

# Føroysk bókaútsøla

## 29. mars - 6. mai 2006

Tey, ið ætla sær at hava bøkur við í stóru bókaútsøluni, verða biðin um at boða Bókamiðsøluni, tlf. 313756, frá skjótast til ber, og í seinasta lagi mánadagin 13. februar.

Ein treyt er, at bókin skal vera útkomin áðrenn 2003, og hon kann einans verða í útsølu tvær ferðir.

Kunning um luttøkugjald og treytir annars fáa tit á:

**Bókadeild Føroya Lærarafelags,**
**Tlf. 317644 · Fax 3319644 · T-postur:bfl@bfl.fo**

# Lutir í konkursbúgvi til sølu

Vegna felag undir konkurs verða fylgjandi lutir lýstir til sølu:
Nissan Patrol, langa modellið, árg. 1994
Lastbilur av mrk. Scania H 82, árg. 1985, óskrásettur
Gravimaskina av mrk. Bobcat 325, árg. 1997
Skúrvognur 3x8 m, árg. 1994.

Áhugað kunnu venda sær til Jóhan J. Lamhauge, adv.ft.

**Advokatfelagið**
Yviri við Strond 4
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311260 · Fax 311261
e-mail: jjl@lawfirm.fo

Tórmóður Djurhuus, adv. Jógvan Páll Lassen, adv.
Petur Even Djurhuus, adv. Jógvan E. Ellefsen, adv.
Anna Dam, adv. Ingi Højgaard, adv.

# Útbjóðing HVS-arbeiði

Fyri Fuglafjarðar kommunu verður HVS arbeiðið í samband við innrættan av kjallaranum í dagstovninum í Fuglafirði hervið boðið út alment. Tað innrættaða økið er uml. 120 $m^2$.

Útbjóðingartilfarið fæst frá fríggjadegnum 27. januar við at venda sær til Pf. Sofus M. Jakobsen ráðgevandi verkfrøðingar FRI.

Lisitatiónin verður mánadagin 13. februar 2006 kl. 15.00.

**Pf. Sofus M. Jakobsen**
Ráðgevandi verkfrøðingar F. R. I.

J. H. Schrøtersgøta 22 · FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 353522 · Fax +298 310622
e-mail: smj@smj.fo



**Hesin NISSAN NAVARA er til sølu. Hann er 2 ára gamal, og koyrt 18000 km. Ring og hoyr nærri á 227635 ella 456935**

Sosialurin
www.sosialurin.fo